## Kenna seg vælkomnan til Klaksvíkar

Klaksvíkar Kommunu fer nú at gera sítt til at nýggir borgarar skulu kenna seg vælkomnar. Framyvir er ætlanin, at nýggj húsarhald og nýggir borgarar, ið flyta til Klaksvíkar, fáa ein sokallaðan startpakka frá Klaksvíkar Kommunu. Í pakkanum verða m.a. ein vælkomuheilsan frá borgarstjóranum, faldarar um ymisk kommunal viðurskiftir og avsláttarmerkir frá vinnurekandi í Klaksvík. Eitt avsláttarmerki kann t.d. vera, at fyrsta vitjanin í svimjihøllini er ókeypis, avsláttur í hárfríðkanarstovu og fyrsta filmframkalling ókeypis. - Við hesum er vónin, at kommunan og tey vinnurekandi saman fáa nýggjar íbúgvar at kenna seg væl, sigur Klaksvíkar kommuna á heimasíðu sínari.

útbjóðararnar, sigur hann.

### Brosma og longa

Jógvan Gregersen sigur, at seinastu trý árini hevur tað verið torført at fingið nakað serligt burtur úr brosmu og longu sum saltfiski.

- Ráfiskaprísirnir á hesum fiskasløgum eru øktir við í minsta lagi 2-3 krónur seinastu fáu árini, men hinvegin hevur verið torført at fingið meira fyri lidnu vørurnar á marknaðinum, sigur hann.

Stjórin vísir á, at Vaðhorn lítið og einki hevur fingið burtur úr brosmuni og longuni síðan 2004, tá ráfiskaprísirnir øktust lutfalsliga nógv meira enn marknaðarprísurin fyri lidnu vørurnar.

- Tað er altíð ein kampur at virka í fiskivinnuni. Viðhvørt tjenar tú eitt sindur, og aðrar tíðir tjenar tú einki.

### Einki serligt

Jógvan Gregersen sigur, at árið í fjør ikki var nakað at reypa av hjá Vaðhorn, og hann hevur ikki tær stóru vónirnar til nakað serligt úrslit í ár heldur.

- Tað verður helst ein spurningur, um vit megna at fáa avlop í ár, sigur stjórin á Vaðhorn.

## nnlækna



*Oddmar Færø, tannlækni og Tordur J. Niclasen, borgarstjóri, undirskriva sáttmála um tvey ára samstarv*



*- Vit fara at keypa úr øllum landinum, og seinni fara vit at kunna um, hvussu sjálv móttøkan verður skipað, sigur Árni Brattaberg, stjóri í Sirri*

# Sirri keypir seyðaskinn

**- Vit hava gjørt avtalu við eitt virki í Portugál um at garva skinnini fyri okkum, og tí kunnu vit nú bjóða okkum at keypa føroysk seyðaskinn, sum annars høvdu endað í brenniovnunum, sigur Árni Brattaberg, stjóri í Sirri**

MARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú nøkur fjøll longu eru gingin, og onnur standa fyri, røktist einki fyri, at nakar bjóðaði seg fram at keypa seyðaskinn í ár. Um eingin keypari meldaði seg, endaðu øll skinnini á brennistøðunum í Havn og Leirvík.

Men soleiðis verður ikki kortini.

Nú hevur ein keypari sagt seg vilja keypa øll væl hagreidd og saltaði seyðaskinn, sum koma frá flettingini í heyst.

Keyparin er Sirri hjá Árna Brattabergi.

### Garvast í Portugál

Árni sigur, at fólk, sum hava seyð at fletta, hava heitt á hann um at finna onkran møguleika, soleiðis at sleppast kann av við skinnini.

- Vit hava nógv sambond kring um heimin, og nú hava vit gjørt avtalu við eitt virki í Portugál sum garvar um at garva øll væl hagreidd seyðaskinn fyri okkum, sum vit kunnu keypa í Føroyum.

Stjórin í Sirri vísir á, at lítið og einki fæst fyri saltað seyðaskinn í útlandinum, og tí er neyðugt at gera meira við tey, áðrenn tey kunnu seljast fyri nakað serligt.

- Skipanin verður hon, at virkið í Portugál nú fer at garva skinnini fyri okkum, sum síðan letur virkið okkum tey aftur at selja til aðrar keyparar.

Hann sigur, at felagið nú fer at leita upp marknaðir fyri garvaðu skinnunum.

### Serkøn fólk

Seyðaskinnini skulu verða íligin, áðrenn tey verða heintað í bingjur, og tí verður móttøkan helst í viku 47 – ella umleið 20. november.

Árni Brattaberg sigur, at tvey fólk, sum starvast á virkinum í Portugál, koma til Føroya at standa fyri móttøkuni. At fólk koma higar, er fyri at tryggja, at skinnini, sum keypt verða, eru í lagi.

- Vit fara at keypa úr øllum landinum, og seinni fara vit at kunna um, hvussu sjálv móttøkan verður skipað.

Stjórin sigur, at felagið hevur gjørt av at lata 20 krónur fyri hvørt skinnið afturfyri Sirri-vørur, og tá fólk vilja hava pengarnar út, fáa tey 10 krónur fyri hvørt skinnið, ið er væl hagreitt.

### Fólk vita...

- Tey, sum fletta, vita, hvussu skinnini skulu hagreiðast. Vanligt er at siga, at eini trý kilo av salti fara til hvørt skinnið. Men hetta nýtist ikki at vera nýtt og óbrúkt salt. Tað ber væl til at salta við brúktum salti, sum fellir frá á fiskavirkjunum, sigur Árni Brattaberg, stjóri í Sirri, sum fegnast um, at rávøran, sum seyðaskinnini eru, ikki endar í brenniovnunum.



*Sirri letur 20 krónur fyri hvørt skinnið afturfyri Sirrivørur – og 10 krónur, tá fólk heldur vilja hava peningin*